DAGSINS MEINING

Keypið eitt avloysaraskip!

Líkt er til, at tað ber ikki til at fáa summi samfelagsmál í Føroyum at virka sum tey skulu. Eitt gott dømi um hetta er samferðslan hjá Strandfaraskipum Landsins. Orsøkirnar eru óivað fleiri. Men høvuðsorsøkin er óivað politiskt.

Eftir at vit fyrst hava havt trupulleikar at fáa avloysaraskip í summar, er nú komið undan kavi, at Smyril kann ikki sigla í vetur. Orsøkin er hon, at tað ber ikki til at fáa eykalutir til útgerðina, sum ger, at skipið ikki rullar so illa. Tí skulu nýggir lutir til aldu-stabilisatorin gerast, og hetta fer at taka fleiri mánaðir, kanska eitt hálvt ár.

Álvaratos, hevur reiðaríið ikki vitað av hesum, ella er tað knappliga komið undan kavi, at stabilisatorarnir vórðu so illa farnir, og at eykalutir ikki fingust? Tað ljóðar í øllum førum løgið, tí eitt reiðarí má fylgja betur við, hvørjum standi skipini eru í, so tey ikki verða løgd í tíð og ótíð.

Tí skulu Strandfaraskip Landsins nú at leita eftir einum avloysaraskipið at sigla Suðuroyarfjørð í vetur. Frammanundan hevur ljóðað, at tað verður ikki lætt. Harafturat sigst, at kostnaðurin liggur millum 50.000 og 100.000 krónur um dagin.

Skal skipið so sigla í einar 5-6 mánaðir verður talan um kanska einar 15 mió.kr. at leiga eitt skip fyri. At leiga eitt skip fyri!!!

Hetta er kanska áleið tað sum tær 13 milli-ónirnar, sum Føroya Landsstýri í síni tíð seldi Teistan fyri!!! Ein avgerð, sum var fullkomiliga burturvið.

Eftir at hava havt trupulleikar av at fáa avloysaraskip, tá skipini skulu til eftirlit ella viðlíkahald, í fleiri ár, og serliga í ár, má politiski myndugleikin gera sær eitt greitt. Og tað er at taka undir gamla uppskoti Javnaðarfloksins um at keypa eitt avloysaraskip, so vit altíð hava eitt eykaskip at sigla, tá onnur skip eru á beding, ella okkurt er áfatt.

Ruðulleikin í ár er dømi um, at skipanin millum stýrandi, játtandi og tænastuveitandi myndugleikan riggar ikki nóg væl. Vinnumálastýrið hevur ábyrgdina, og tað er eitt fólkakrav, at betri skil kemur í samferðsluviðurskiftini!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Sambandsflokkurin og demokratiið

Jógvan við Keldu
tingmaður fólkafloksins

Vísiliga er staðfest, at hevur eitt stýri ikki meiriluta ímóti sær, verður løgmaður sitandi og ger sínar royndir at fáa ein meiriluta at halda fram. – Soleiðis er í øðrum londum, har eru enntá minnilutastýri.

Síðani løgtingsvalið hava bæði formaður Sambandsfloksins, onnur úr flokkinum eitt nú Kaj Leo Johannesen og ikki minst málgangn floksins, Dimmalætting, funnist at ódemokratisku framferð Fólkafloksins og samgongunar.

Tað tykist ikki sum hesi skilja munin á at kenna seg ótrættvíst viðfarnan og hinumegin vanlig lógar- og rættarviðurskifti.

Tað er munur á at kenna seg órættvíst viðfarnan og at halda, at hetta samfelagsliga júst er ódemokratiskt ella kanska verri, eitt diktaturumhvørvi.

Føroyska samfelagið er sera viðbrekið. Ofta stutt er millum upp- og niðurgongdir. Skjótt er frá ovurnýtslu til hóttafall.

Vísiliga er tí staðfest í føroysku stýrisskipanini, at hevur stýri ikki meiriluta ímóti sær, verður løgmaður sitandi og ger sínar royndir at fáa ein meiriluta at halda fram.

– Soleiðis er eisini í øðrum londum, har tey hava siðvenju í minnilutastýrum.

Hetta gevur støðufesti og er gott fyri menningina.

Ábrygdarleyst at latið frá sær

Um so var, at formaður Sambandsfloksins sat í sama sessi sum formaður Fólkafloksins, og annar flokkur var størri, trúgvi eg neyvan, at hesin bara hevði latið frá sær, um hann ikki hevði meiriluta ímóti sær. – Tað hevði verið ábyrgdarleyst.

Sekstan og sekstan er einaferð tað sama. - Seytjan er meiri enn fimtan.

Tað hjálpir tí ikki at ganga í tí trúgv, at er ein flokkur størstur, liggur leiðin opin.

Tykist órættvíst men er ikki ódemokratiskt

Eftir seinasta kommunuval, var Fólkaflokkurin í Klaksvík nógv størsti flokkur. Eg fekk sjálvur fimta valið á rað nógv flestar atkvøður, meiri enn nakar annar nakrantíð hevur fingið til eitt kommunuval her.

At Tjóðveldisflokkurin og Steinbjørn O. Jacobsen saman við Javnaðarflokkinum og Gamla Sjálvstýri í felag fingu hektað Fólkaflokkin og meg av, somu løtu valúrslitið fyrilá, og eg ikki hevði nakran møguleika sum nógv størsti flokkur við nógv flestum persónligum atkvøðum at koma til máls, kundi tykjast órættvíst, og tyktist órættvíst fyri minst 30 til 40% av fólki í Klaksvíkar kommunu, men eg kendi tað ongantíð sum ódemokratiska framferð. – Har var talan um seks av ellivu limum, og seks er einaferð meiri enn 5.

Eg hevði einki, og havi einki annað at gera, enn at arbeiða fyri teimum málum vit hava sett okkum, við teimum hugsjónum og evnum vit einaferð hava.

Nýtið skapanarevni - mennið hugsjónirnar

Eisini hugsaði eg í umdystinum Svoríki - Senegal í 1/8 finaluni, at Svoríki rakti á stólpan og út, meðan senegalesar fingu stólpan og inn, og komu víðari.

So lítið sum hetta hevur við ódemokratiska viðferð at gera, hevur framferð Fólkafloksins yvirfyri Sambandsflokkinum at gera. – Men hetta kann tykjast órættvíst.

Nú fagnaðurin í samband við at Sunleif Rasmussen fekk Norðurlanda-tónlistaprísin var í Norðurlandahúsinum í Føroyum, kundi roknast við, at limir føroyinga í Norðurlandaráðnum vórðu bodnir við. – Tað vóru teir ikki.

Hetta kann tykjast eitt sindur órættvíst – ella kanska lítið umhugsað – men tað hevur líka lítið við ódemokratiska framferð at gera, sum viðferð Fólkaflokksins hevur verið yvirfyri Sambandsflokkinum.

Tí heiti eg á Sambandsflokkin - sum ein borgarligan flokk - at brúka síni evni og sínar hugsjónir at vinna føroyingum longur á leið í menningini, heldur enn at at vera uppsteðgaðir í at kalla tað ódemokratiskt, sum ein sjálvur heldur tykjast vera nakað órættvíst. – Eisini at Tjóðveldisflokkurin møguliga gjørdi Sambandsflokkin til størsta flokk.

Farið annars inn á heimasíðuna
www.get.to/keldu
Teldupostur:
keldu@post.olivant.fo

Miðsummarhaldið í Klaksvík

Leygardagin verður miðsummarhaldi, Náttúran og Menniskjað, hildið í Klaksvík

MIÐSUMMAR
Tíðindaskriv

Miðsummarhaldið »náttúran og menniskjað« í Klaksvík verður hildið nú leygardagin 22. juni.

Tað eru skótaliðini í Klaksvík og Norðoya Fornminnafelag, sum skipa fyri tiltakinum.

Sum vanligt tendra skótarnir eldarnar kl. 14 í Grøvini, har høvi verður hjá børnum og vaksnum at hugna sær til kvøldið kemur.

Kl. 19 verður miðsummarrøðan, og í ár verður tað Rani Nolsøe, býráðslimur, ið fer at halda røðuna.

Eisini verður sungið úr sangheftinum, og aftaná tendra skótarnir bál niðri í fjøruni.

– Sum er sigur hann frá hampiligum veðri, tó ikki so lýtt, sum tað hevur verið seinastu tíðina, men vónandi viðrar tað leygardagin.

Tó so, tað verður ivaleyst veður at fara ein gongutúr út í náttúruna. Hvaðar farið verður er ikki fastlagt, men verður tað upplýst undir fundinum, sigur Norðoya Fornminnafelag í tíðindaskrivi.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ein vandamikil og ókvalifiserað avgerð um Fiskivinnuskúlan

Hans Pauli Strøm,
javnaðarmaður,Vestmanna

Av tí at Mentamálastýrið hevur kolldømt ætlanina at byggja nýggjan Fiskivinnuskúla í høllini inni á Fjørð í Vestmanna, kemur Fiskivinnuskúlin í alstórar trupulleikar longu eftir summarfrítíðina. Tær umstøðurnar, sum longu nú eru heilt út av lagi, verða uppaftur verri, tá enn fleiri næmingar til nýggja útbúgving í heyst skulu troðkast inn í yvirfyltar skúlastovur.

Hendan avgerðin hjá Mentamálastýrinum at kolldøma byggiætlanina inni á Fjørð, kann fáa lagnutungar avleiðingar fyri Fiskivinnuskúlan. Varð byggiætlanin inni sett í verk, hevði skúlin havt nøkur nýggj hølir at tikið í nýtslu longu eftir fáum mánaðum, og longu eftir einum ári kundi skúlin staðið liðugur - samstundis kundi gamli skúlabygningurin staðið klárur til harðliga tiltrongt skúlaheim. Men hetta er kolldømt. Og av tí at tað nú fer at taka fleiri ár at seta eina nýggja byggiætlan í verk, er vandi fyri at tær versnandi umstøðurnar, sum hesin misrøkti skúli skal dragast við fleiri ár aftrat, so líðandi kunnu taka grundarlagið undan honum.

Tað ringasta er, at nógv bendir á, at Mentamálastýrið hevur tikið eina ókvalifiseraða avgerð á einum ivingarsamum grundarlagið. Mentamálastýrið vísir til, at út frá kanningum av bygningi og undirlendi hevur byggiumsitingin hjá landsstýrinum mælt frá at keypa høllina til at hýsa skúlavirksemi. Men spurnartekin kann setast við hesa sonevndu "kanning": hon kann ikki sigast at vera annað enn rættiliga "yvirflatisk" bókstaviliga sæð, tí ikki ein fingur, tíansheldur ein spaki, er settur í jørðina til at kanna sjálvt undirlendið! Hóast tað júst er pástandurin um at undirlendið er svikaligt, sum tann kolldømandi avgerðin byggir á, so er sjálvt undirlendið ikki kannað! Enn minni er kannað, hvussu bygningurin rættiliga einfalt kundi verið tryggjaður móti einum møguligum trupulleika í tí eina horninum, sum ikki beinleiðis stendur á hellu. Tað er undir øllum umstøðum ósatt, tá Mentamálastýrið út frá hesi "kanningini" sigur, at høllin stendur á fyrrverandi ruskplássi. Tað fyrrverandi ruskplássið lá væl niðanfyri, har hendan høllin stendur.

Tað rætta er, at nýggjar kanningar verða gjørdar sum skjótast av høllini og undirlendinum. Vísa tær tað, sum skilamenn í Vestmanna halda, at høllin uttan hóvasták kann brúkast til skúlavirksemi, kanska við onkrari ábót, so høvdu vit eftir stuttari tíð havt ein nýggjan Fiskivinnuskúla, ein menningardepil fyri fiskaíðnaðar- og havbúnaðarvinnuna í Føroyum. Og hetta er ikki ein kostnaðarmikil ætlan.

Hitt alternativið, sum Mentamálastýrið nú ætlar sær undir, at leita eftir nýggjum grundøki og fara undir eina nýggja ætlan frá grundini av, fer at taka fleiri ár at fremja, og kostnaðurin verður minst 3 ferðir so stórur. Men so kann Tjóðveldisflokkurin sjálvsagt spæla sitt propagandasirkus við hesi ætlanini nøkur ár, við arkitektakapping og einari ceremoni fyri og aðrari eftir - heilt fram til næsta val, tá egnast skal av nýggjum.

At enda havi eg eina viðmerking til grein í Dimmu í gjár hjá Alfred Olsen úr Sambandsflokkinum um Fiskivinnuskúlan og Tjóðveldisflokkin. Har gevur hann m.a. lesarunum fatanina av, hvussu hann gekk á odda fyri at útvega eina eykajáttan uppá 3 mió. kr. til at fara undir innrættingina í høllini til nýggjan Fiskivinnuskúla. Veruleikin er tann, at undirritaði tók stig til og gjørdi uppskotið til hesa eykajáttan. Eg fór runt til allar flokkar at biðja umboð hjá teimum verða meduppskotsstillarar. Eg bað eisini Alfred Olsen, sum játtaði at verða við. Hetta eydnaðist so væl, at umboð úr øllum flokkum stóðu aftan fyri uppskotið. Og tí var tað samtykt. 7 tjóðveldismenn atkvøddu ímóti, allir aðrir tingmenn atkvøddu fyri. Soleiðis var tað.

Verða løgverjan og rættarskipanin kortini yvirtikin í hesum valskeiðinum ?

Helgi Abrahamsen

Sambært Degi og Viku tann 27. mai, so segði Sjálvstýrisflokkurin (í sambandi við samgongusamráðingarnar), at tað kom ikki upp á tal at yvirtaka løgverjuna og rættarskipanina í hesum valskeiðinum.

Hetta ljóðaði skilagott, og vóru vit mong sum vónaðu, at Sjálvstýrisflokkurin við hesum ætlaði at halda sítt vallyfti um at "vera bremsan í einum fullveldislandsstýri".

Men nú um dagarnar lýsir Løgmansskrivstovan eftir aðalstjóra til nýggja Løgmálaráðið. Í lýsingini stendur millum annað:

"Aðalstjórin fær høvuðsábyrgdina av at skipa Løgmálaráðið og skal standa fyri at skipa arbeiðið viðvíkjandi yvirtøkuni av løgregluni og rættarskipanini."

Spurningurin er so um hetta merkir, at løgreglan og dómsvaldið kortini verða yvirtikin í hesum valskeiðinum, ella um vit skulu trúgva, at eitt fólk verður sett í starv í juli 2002 fyri at gera eitt arbeiði, sum ikki verður sett í verk fyrr enn aftaná tann 30. apríl í 2006 ?

- Hvar fór bremsan ?

Nýggja samgongan & samgonguskjalið?

Hans Birgir Hansen
Mr. Big

Eg eri nøgdur við at hava fingið somu samgongu og fingið Miðflokkin afturat og eitt samgonguskjal orðað og undirskrivað, ið ein hevur fingið kunnað seg við at hava lisið tað!

Tað er gott, at aðalstýrini hava slept heitið stýri og fingið ráð ístaðin, ið líka sum ljóðar betur í oyrunum hjá øllum vanligum føroyingum og teimum minni mentaðu í dag!

Eg havi hvørja ferð, vit fáa samgongugskjal orðað og undirskrivað, kent meg aftur í teimum, tá ein sum samfelagsborgari ígjøgnum bløðini fær sett síni fingramerki!

Eg havi fingið kunnað allar blaðlesarar mínar hugsjónir, atburðir, hugburðir, málburðir, ið ein heldur fram við, og at fylgja við øllum tí, ið hendir í øllum landinum!

Eg eri eisini nøgdur við býtið av málsøkjum millum løgmann og landsstýrismenn/kvinnu, ið ein moralskt vil stuðla í fýra ára løgtingsvalskeiðnum í kjakinum!

Eg havi nógv at stríðast fyri betri fortreytum/grundarlag føroyinga at liva og virka sjálvstøðugt uttan mun til hvør ið ein er, høgur/lágur í samfelags høpi í dag!

Eg havi í umbúna eftir ólavsøku at taka upp aftur táttin við Tey Grønu í Føroyum & orkusparandi tøknina, ið danin Viggo Henning Flach sáli skapti í sínari tíð!

Eg havi í umbúna at gera nógv fyri at kunna føroyingar um týdning av at fyribyrgja og lekja deyðiligar sjúkur/fylgisjúkur við náttúruheilivági /náttúruúrdráttum!

Eg eri nøgdur við at alt kemur at ganga mær eftir vild, tí ein hevði rætt í øllum tí, ein førði fram ímóti arvafíggindum, í øllum landinum, seinastu árini.

Eg havi við hjálp av bløðum, útvarpum, sjónvarpi fingið framburð, trivnað, persónliga menning í lívslanga arvastríðnum ímóti øllum, ið nýttu øll tey skitnastu vápnini1

Eg vil takka bløðunum fyri ta vælvild tey í seinastuni eru farin at vísa einum, ið vil koma víðari í lívnum.

Privatisering og skúlabarnaflutningur

Rættleiðing til Dag & Viku fríggjakvøldið tann 14. juni 2002, um avleiðingar av útbjóðingum hjá Bygdaleiðum á skúlabarnaflutning

Reidar Nónfjall

Í Degi & Viku fríggjakvøldið tann 14. juni 2002, varð umrætt, at vantandi kapasiteturin á Bygdaleiðum til bólkaferðir hjá skúlabørnum kemst av privatisering. Talan er ikki um privatisering, men um útbjóðingar av rakstraruppgávum. SL høvdu aftaná útbjóðingina um ársskiftið, bara tríggjar bussar eftir, sum røkja flogleiðina. Hesar umleggingar í rakstrinum, saman við rationaliseringum í ferðaætlanini, hevur havt við sær, at avlopskapasiteturin er vorðin til tað, sum mett er tænastuliga og fíggjarliga ráðiligt.

Viðmerkjast kann, at SL fyrr hevði eitt sindur lættari við at seta inn onkran eykabuss, um t.d. ein bussur hjá SL stóð á Farstøðini, og bussførarnir vóru til arbeiðis álíkavæl. Tá bar til í einstøkum førum, at seta inn eykabuss t.d. til Vestmannar.

SL hava í ferðaætlanini fastar mannagongdir fyri, hvussu skal bíleggjast. Hesar mannagongdir vísa, at bólkar skulu bíleggja í minsta lagi tveir arbeiðsdagar frammmanundan. Frá starvsfólkunum á Farstøðini fekk Veningarskúlin upplýst, at túrurin tey ætlaðu sær við, longu var fullsettur, og at tað ikki kundi lata seg gera at koma við.

Vanligt er, at starvsfólkini í rutupplýsingini hjá SL um kvøldið, avgreiða allar fyrispurningar um bólkaferðir, og senda skrivligt svar út, har bólkarnir antin fáa játtan ella noktan um bílegging. Um bílegging verður noktað, verður vanliga í staðin víst til aðrar loysnir:

- Bólkurin kann sleppa við annan túr
- Um bólkurin býtir seg sundur, so kunnu tey sleppa við tveir fylgjandi túrar (henda møguleika brúkti Venjingarskúlin ikki)
- Um bólkurin skal ferðast til ásettu tíðina, so vísa SL til annan arbeiðstakara í økinum, sum kann avgreiða flutningin til ein sámuligan prís.

SL hava valt, at raðfesta ílogur í nýggjar og tryggar bussar høgt, og tí kostar tað nógv eyka at seta inn ein meirkapasitet, á ávísum farleiðum til ávísar tíðir. Upplýsast kann, at SL flyta nógvar bólkar við skúlabørnum og tað er bara í ávísum førum, at hetta ikki ber til vegna plásstrot.

Tað er óheppið fyri ein sakligan tíðindaflutning, at SL í hesum førum ikki fær tær ítøkjuligu upplýsingar, sum neyðugir eru frá tíðindamanninum, áðrenn samrøðuna við leiðaran á fólkaflutningsdeildini hjá SL. Hetta hevði við sær, at sjónarmiðini og upplýsingarnar hjá SL fingu lítið og onki pláss í innslagnum. Hinvegin vildu faktuellir upplýsingar frá SL uttan iva tikið grundarlagið undan hesum høvuðsinnslagnum eitt fríggjakvøld.